# Peter Holm keypt seg inn í Føroya Banka

**Saman við dótturfelag hjá Tjaldur hevur fyrrverandi Kaupthing-stjórin keypt 9,73% av partapeninginum í Føroya Banka**


*Peter Holm*

**BANKI**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Peter S. Holm tóktist vera farin burtur úr føroysku bankaverðini, tá Eik keypti føroysku deildina hjá Kaupthing beint fyri ársskiftið. Men nú er hann aftur í sama bankaheimi.

Hetta verður upplýst í tíðindaskrivi, sum er sent føroysku miðlunum.

P/f Skrínið, sum P/f Tjaldur eigur og Sp/f H-Holding, sum Peter Holm eigur hava gjørt eina avtalu, har partabrøvini, sum P/F Skrínið higartil hevur átt í Føroya Banka verða seld til nýstovnaða felagið sp/f Blábjørg.

Talan er um 973.151 partabrøv svarandi til góð 9,73% av partabrøvunum í Føroya Banka. P/f Skrínið og Sp/f H-Holding eiga 50 prosent hvør í nýggja partaeigaranum í Føroya Banka – Sp/f Blábjørg. Peter Holm verður stjóri í Sp/f Blábjørg.

Næstu 12 mánaðirnar hevur Sp/f H-Holding rætt til at keypa restina av partabrøvunum í Sp/f Blábjørg.

Í viðmerking sigur Peter Holm, at hann sær hetta sum eina áhugaverda íløgu.

- Bankin hevur stórt potentiali til at menna seg, og tað ger partabrævið til eina áhugaverda íløgu sigur Peter S. Holm.

# Listasavnið fingið listfrøðing og listmiðlara


*Ingeborg Bugge*


*Oggi Lamhauge*

1. september setti Listasavn Føroya tvey nýggj fólk í starv. Í starvi sum listfrøðingur er komin Ingeborg Bugge, meðan Oggi Lamhauge er settur í starv sum listmiðlari.

Ingeborg Bugge hevur holla listfrøðiliga vitan og hevur í fleiri ár undirvíst í listasøgu við Aarhus Universitet. Hon hevur góðar royndir í at kuratera framsýningar og hildið nógvar fyrilestrar, umframt at hon hevur skrivað fleiri listasøguligar bøkur, greinir og framsýningarbøkur. Hon er í holt við Ph.d ritgerð við Aarhus Universitet.

Eisini hevur Listasavn Føroya sett Oggi Lamhauge í starv sum listmiðlara við serligum atliti at miðling fyri børn.

Oggi Lamhauge er útbúgvin námsfrøðingur umframt útbúgvin listgrafikari við lærda háskúlan í Íslandi. Hann hevur gjørt hópin av serprentum fyri stovnar og virkir, og kendasta verkið er altartalvan í Hattarvíkar kirkju frá 2001. Oggi Lamhauge hevur fjølbroyttar royndir bæði sum námsfrøðingur og at undirvísa yngri sum eldri í grafikki, tekning- og máling

**-ave-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 B. 5D 1C3** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** HU 700 **Km:** 130.000
**Árgangur:** 06.10.2003
**kr. 115.000,-**


**TOYOTA CAMRY 3.0 GL AUT.** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** ER 235 **Km:** 127.131
**Árgangur:** 12.04.2000
**kr. 124.000,-**


**TOYOTA RAV4 2.0 VVT-I PLUS** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** LF 118 **Km:** 12.000
**Árgangur:** 16.02.2007
**kr. 298.000,-**


**COROLLA 2.0 LINEA TERRA D-4D** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** HE 038 **Km:** 217.000
**Árgangur:** 07.08.2002
**kr. 85.000,-**


**YARIS 1.4 H/B TERRA D-4D V/KOM.** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** TR 239 **Km:** 55.918
**Árgangur:** 21.09.2005
**kr. 138.000,-**


**HIACE 2.4TD, STUTTUR, 4WD** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** EG 745 **Km:** 250.000
**Árgangur:** 21.12.1998
**kr. 86.000,-**


**COROLLA 1.4 TERRA D-4D** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** NK 419 **Km:** 45.000
**Árgangur:** 11.07.2006
**kr. 174.000,-**


**TOYOTA HI-ACE 2.4 STUTTUR**
**Skrásetingarnr:** PV 310 **Km:** 217.888
**Árgangur:** 13.12.2000
**kr. 78.000,-**


**TOYOTA COROLLA 1,4 LUNA D-4D** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** SF 673 **Km:** 88.209
**Árgangur:** 19.05.2005
**kr. 165.000,-**


**HIACE, 2.4 D, STUTTUR, 4D** — 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** BF 270 **Km:** 104.981
**Árgangur:** 05.07.2000
**kr. 85.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F



**RUKO LÁSATÆNASTA**

Ruko

- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem



Vit eru serkønir á økinum

VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ · *TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA*
SKÁLATRØÐ 14 · TÓRSHAVN · TEL 30 10 20